# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan-00, Km 64.500 .
Kr. 99.000.



**CITROEN XANTIA 2.0HDI 5H**
Árg Jun-99, Km 43.000 .
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI PAJERO 2.8TDI**
Árg Sep-97, Km 82.000 .
Kr. 177.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.6I 5H**
Árg Mar-97, Km 64.000 .
Kr. 105.000.



**JEEP CHEROKEE 2.5TD VAN**
Árg Jul-97, Km 80.000 .
Kr. 135.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg Apr-95, Km 152.000 .
Kr. 80.000.



**CITROEN XSARA 1.9HDI 5H**
Árg Jun-99, Km 117.000 .
Kr. 137.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mar-99, Km 45.000 .
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI GALANT 2.0**
Árg Jun-92, Km 150.000 .
Kr. 37.000.



**FORD MONDEO 1.8 4H**
Árg Jun-01, Km 16.000 .
Kr. 210.000.



**AUDI A4 1.6 4H**
Árg Sep-96, Km 77.500 .
Kr. 152.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg Aug-99, Km 36.000 .
Kr. 115.000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC**
Árg Apr-99, Km 36.000 .
Kr. 133.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apr-00, Km 27.500 .
Kr. 105.000.



**OPEL ASTRA 1,6 STW**
Árg. mai-98, km 64.000,
sýnaður mai 2002, vælhildin,
kr. 115.000.
*tlf. 319440*







# ítróttur

Nr. 144 • hósdagur • 1. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Klassamunur



*Frá vintru ovast: Magnus Magnussen (lækni), Ove Nysted (hjálparvenjari), Ann Olsen, Petra Sjóstein, Poula Sjóstein, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Mariann Joensen, Una Olsen, Annelisa Justesen, Vivian Bjartalíð og Jón Harald Poulsen (venjari)*
*Frá vinstru niðast: Jensa Sirdal, Paula Mikkelsen, Bára Skaale, Elsa Maria Simonsen, Ragna Andreasen, Vivi Andreasen, Jonna Niclasen, Malena Josephsen og Rannvá Andreasen*

**HB-kvinnurnar høvdu sera lítið at bjóða uppá, og dysturin gjørdist tí aldrin eina rætta finalu, tí til tess, var munurin alt ov stórur á liðunum**

STEYPAFINALAN, KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

KÍ-kvinnurnar stevna ímóti greipuni. Í góðveðrinum ólavsøkudag hølvaðu tær HB av, og eru steypavinnarar fyri kappingarárið 2002. Dysturin endaði heili 6-1 til klaksvíkskvinnur, og dysturin var enn eitt prógv um, at KÍ-kvinnurnar verða ringar at taka í ár.

## KÍ legði út sum ódnarveður

Dysturin var ikki meir enn minuttin gamal, so høvdu klaksvíkskvinnur lagt seg á odda. Málið kom eftir sera gott einmansavrik frá Elsu Maria Simonsen, har hon sneiddi fleiri HB-leikarar av, og setti bóltin framvið HB-málverjanum Randi Wardum.

KÍ legði rættiligt trýst á HB fyrstu løtuna, við skjótum og ágangandi spæli, og tað tyktist sum um, at HB-liðið slettis ikki megnaði at fylgja við. Ágangandi spælið bar eisini ávøkst, tí tá 25 minuttir vóru farnir, stóð 3-0 til KÍ.

Miðvallarnir, Bára Skaale og Rannvá Andreasen, høvdu seinasta fót á til hesi bæði málini. Dysturin var í royndu veru avgjørdur longu tá, og KÍ-kvinnurnar skuldu bara, tað sum írestaði av dystinum, halda tørn.

HB hevði ikki tað stóra at bjóða uppá, og einasta løtan, havnarkvinnur vóru í dystinum, var tá tær 10 minuttir fyri hálvleik, minkaðu um munin. Eftir innlegg úr høgru er Ása úr Dímun hægst og fær stútað bóltin framvið Vivi Andreasen í KÍ-málinum.

Høvdu HB-kvinnurnar verið hepnar, so kundu tær fingið enn eitt mál løtu seinni, tá Eyðfríð Kristiansen streyk ígjøgnum. Eyðfríð varð í seinastu løtu tacklað av KÍ-verjuleikara, eftir at hon hevði beina kós ímóti málinum.

## Einvegis ferðsla

Tá farið var til hálvleiks, stóð 3-1 til KÍ. KÍ-kvinnur góvust ikki so, hóast tær spældu við lægri blussi í seinna hálvleiki. KÍ hevði stóra yvirvág í spæli, og HB var ikki meir enn onkra hendingaferð inni í KÍ-brotsteiginum.

10 minuttir inn í seinna hálvleik lá bólturin aftur í HB-málinum. Vivian Bjartalíð royndi seg við góðum langskoti, og bólturin streyk upp í nettakið.

Kí hevði fullkomiliga tak á dystinum, og eftir málið til 4-1 var allur ivi, viðvikjandi úrslitinum burtur.

Tvey mál komu afturat. Miðskeiðis í seinna hálvleiki, var Malena Josephsen fyrst á bóltinum eftir hornaspark, og kundi hon ótarnað økja um KÍ-leiðsluna.

Fimtan minuttir fyri leiklok var aftur galið hjá HB. Ein frálíka sending frá Malenu Josephsen finnur Rannvu Andreasen, sum lyftir bóltin uppum HB-málverjan og setti punktum fyri størsta sigri í eini steypafinalu higartil hjá kvinnunum.

Alt ov stórur munur var á liðunum til, at dysturin nakrantíð bleiv spennandi, og sjáldan hevur verið so lítil spenningur um steypafinaluna hjá kvinnum, sum í ár. Leikara fyri leikara er KÍ-liðið betri á næstan øllum plássum, og umframt tað, tykjast tær at verða nógv betri fyri enn HB-kvinnurnar. KÍ-kvinnurnar kunnu við sigrinum stevna ímóti greipuni, sum tær eisini vunnu fyri tveimum árum síðani.

Sosialurin ynskir KÍ-kvinnunum tillukku við steypasigrinum.

**Dysturin í tølum:**
**HB-KÍ 1-6 (1-3)**
01. 0-1 Elsa M. Simonsen
07. 0-2 Bára Skaale
23. 0-3 Rannvá Andreasen
34. 1-3 Ása úr Dímun
58. 1-4 Vivian Bjartalíð
62. 1-5 Malena Josephsen
76. 1-6 Rannvá Andreasen

**HB:** 1. Randi Wardum, 6. Gunn Müller, 4. Linda Jacobsen, 12. Liljan Petersen, Kristina Simonsen, , 15. Linda Weihe, Eyðfríð Kristiansen, 7. Silja á Borg, 10. Eyðvør Thomsen, 14. Ása úr Dímun, 2. Malan á Dunga
**Venjarar:** Sigmund Mikkelsen og Andrass Thomassen
**KÍ:** 1. Vivi Andreasen, 7. Ragna Andreasen, 19. Poula Sjóstein, 11. Paula Mikkelsen, 15 Vivian Bjartalíð, 20. Bára Skaale, 18. Elsa Maria Simonsen, 6. Jensa Sirdal, 14. Una Olsen, 8. Malena Josephsen, 9. Rannvá Andreasen
**Venjarar:** Jón Harald Poulsen og Ove Nysted